

Trygvi Johansen á føroysku viðskiftastovuni:

Ove er góð reklama fyri Føroyar

Á føroysku viðskiftastovuni í Keypmannahavn hava tey havt úr at gera hesar seinastu dagarnar at fyrireika móttøkuna hjá Ova Joensen.

Trúgvi Johansen, leiðari av Viðskiftastovuni sigur, at tað er eingin ivi um, at ferðin hjá Ova er góð reklama fyri Føroyar. Hann visir á, at hóast bløðini eisini hava dugað at sæð tað skemtiliga í hendingini, so hava tey eisini lagt stóran dent á, at hetta er eitt satt bragd og hevur umróðan eisini verið harefter — positiv.

Trúgvi Johansen hevur búð í Danmar í 13 ár og sigur, at hann ongantíð hevur upplivað so stóra umróðu av nøkrum føroyskum sum ferðini hjá Ova.

Uppá fyrispurningum um ferðin hjá Ova er størri reklama fyri Føroyar enn Færøerne i Fokus sigur hann, at tað ber ikki til at samanbera hesi bæði.

— Men eg haldi, at tað er gott at fyljga »Fokustiltakinum« upp við slíkari hending sum hesi og vísir tað seg eisini, at danir yvirhøvur vísa stóran ans fyri Føroyum.

jan





